# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Friðarvirðislønin

Tað var svenski ríkmaðurin, uppfinnarin av dynamittinum, Alfred Nobel, ið stovnaði Nobelfriðarvirðislønina. Umframt hesa virðisløn, sum norska stórtingið letur, stovnaði Nobel virðislønir í bókmentum, læknafrøði, evnafrøði, alisfrøði v.m. , ið svenska akademiið letur. Sambært testamenti Nobels skal virðislønin latast persóni, ið hevur framt virkið og miðvíst avrik ímóti kríggi og militarismu. Seinastu áratíggjuni hevur Nobelnevnd norska stórtingsins havt eina sera breiða tulking av hesum hugtaki. Henda heimsins mest tignarliga virðisløn er latin umhvørvisfólki, mannarættindafelagsskapum og einstaklingum eins væl og felagskapum, ið stríðast móti fátækdømi og neyð. Virðislønin var sostatt alt meira vorðin ein humaniter virðisløn, og hesa broyting hava nógv fegnast um.

Nú hevur Nobelnevndin so latið friðarvirðislønina fyri 2008 til fyrrverandi finska forsetan Marti Ahtisari. Við hesi avgerð halda eygleiðarar, at Nobelnendin so at siga leitar aftur á upprunaligu ætlanina hjá Nobel við virðislønini, nevniliga, at hon skal vera ein viðurkenning fyri eitt vælútint og úrslitaríkt arbeiði móti kríggi. Tað munnu helst vera ymsar meiningar um hesa broyttu kós, tí breið semja er um, at hungur, fátækdømi og stríð um tilfeingi eru vanligar krígsorsøkir. Mong høvdu í ár vónað, at friðarvirðislønin skuldi fara til eitt nú kinesiskar mannarættindastríðsmenn, ella til fólk ella felagsskapir, ið berjast fyri fólkaræði í Asia ella í Afrika, men tað gjørdist so Ahtisari, ið fekk heiðurin

Uttan mun til hvørja áskoðan, ið ein hevur í hesum spurningi, munnu flestøll við áhuga fyri friði og mannarættindum fegnast um, at friðarvirðislønini verður latin Marti Ahtisari. Ahtisari hevur bæði sum forseti Finlands í síni tíð og eftirfylgjandi sum altjóða friðarseminsmaður framt stór diplomatisk brøgd fyri heimsfriðin. Ahtisari er tikin úr leikum sum friðarsemingsmaður og hevur stóra virðing um allan heim. Hann hevur verið virkin í Miðeystri, Indonesia og ikki minst á Balkan, har tað ikki minst er Ahtisari fyri at takka, at útlitini fyri varandi friði eru betri enn nakrantíð áður.

Tað er hugvekjandi, at tað júst er ein finlendingur, ið fær friðarvirðislønina. Tað kundi fyri alt tað eins væl verið ein senskari, ið fekk heiðurin. Hesi bæði lond hava í áratíggjur notið stóra altjóða virðing. Hetta kemur eitt nú av, at londini leingi vóru heilt uttanveltað og sum heild átóku sær eina stóra ábyrgd fyri altjóða friði og friðarvarveitandi tiltøkum. Hesi bæði Norðurlond eru ikki so uttanveltað longur, men tey hava alt upp eitt lið av altjóða friðarvarðveitandi diplomatum, ágrýtnar og dugnaligar eldsálir, sum eru við til at tryggja Norðurlondum eina sterka støðu í heiminum. Ahtisari er ein av hesum eldsálum, sum væl og virðiliga hevur uppiborið heiðurin.

**Sosialurin**

## Steðgið larminum!

MAGNI FLES

**Ein innilig áheitan á mynduleikarnar um at seta reglur í verk, sum kunnu verja okkum móti larmi, ið kann geva varandi hoyriskaðar**

Fyri fimm árum síðani kom undirritaði at standa tveir til tríggjar metrar framman fyri einum hátalara, sum var 420 watt. Áðrenn eg vardi, fór hátalarin á fulla styrki í umleið eitt sekund, og eg merkti alt fyri eitt, at okkurt hendi í oyrunum. Líka síðani hava eg verið plágaður av nógvum óljóði í oyrunum, eisini nevnt tinnitus.

Í fjør leitaði eg mær hjálp uttanlands og fór á skeið hjá Den Tværfaglige Sunhedsklinik á Sankt Knudsvej 56 í Keypmannahavn, har eg kom í prát við ein ungan tónleikara. Hann greiddi mær frá, at einaferð hann skuldi flyta ein hátalara, kom ein annar til at stíga á fótpedalina, og hátalarin fór á fulla strykri. Har var onki at gera. Trummuhinnurnar hjá unga tónleikaranum sprongdust, og hann bleiv so meint raktur av tinnitus, at hann mátti gevast sum tónleikari. Síðani royndi hann seg sum hýruvognsførara, men hesum mátti hann eisini gevast við. Trupulleikin var, at hann ikki longur fekk savnað tankarnar nóg væl. Eins og hann, fekk eg eisini trupulleikar við at savna meg, tá eg aftur setti meg á skúlabonk aftaná hendingina við hátalaranum.

### Hvat er tinnitus?

Hvat er tað so, sum hendir, tá fólk fáa tinnitus? Í flestu førum kemur skaðin av ov nógvum larmi. Inni í oyranum eru á leið 30.000 hárkyknur, sum eru umgyrdar av vætu. Tú kanst næstan samanbera hetta við eitt akvarium við nógvum plantum í. Tá akvariepumpan steðgar, standa planturnar beint uppeftir eins og hárkyknurnar í oyranum, tá onki óljóð er. Tá pumpan verður sett til, byrja planturnar at røra seg eins og hárkyknurnar, tá óljóð rakar tær. Jú harðari pumpan gongur, jú meir boygna planturnar - jú harðari ljóðið er, jú meir boygna hárkyknurnar í oyrunum.

Heldur pumpan á at vera hart frá í longri tíð, kann tað enda við, at planturnar falla á botn ella brotna av. Tað sama hendir við hárkyknunum, um vit vera fyri nógvum óljóði í longri tíð.

Verður pumpan knappliga sett á fulla styrki, kann tað henda, at planturnar brotna av alt fyri eitt. Tað sama hendir við hárkyknunum, um tær knappliga verða raktar av ógvusligum ljóði, til dømis um fýrverk brestir beint við oyruni, ella tú kemur at standa beint við ein hátalara, sum fer á fulla styrki bara ein brotpart av einum sekundi.

Munurin er, at planturnar kunnu vaksa aftur. Tað kunnu hárkyknurnar ikki - tær eru oyðilagdar fyri altíð.

### Ung í vanda

Mínar upplivingar hava fingið meg at hugsa um nógv umrøddu Pisakanningina, har føroysk skúlabørn dumpaðu so dyggiliga. Eg meti, at orsøkin til vánaliga Pisaúrslitið væl kann hugsast at hanga saman við, at ung fólk í Føroyum eru so nógv plágað av hoyriskaðum. Og størsta orsøkin er, at vit hava ongar lógir og reglur, sum kunnu verja okkum.

Í Føroyum byrjaðu trupulleikarnir við hoyriskaðum av álvara fyri 15 til 20 árum síðani, tá mynduleikarnir tóku av øll avgjøld á musikkanlegg og annað, sum hartil hoyrir. Síðani tá hava ung fólk keypt sær stór og kraftmikil musikkanlegg fyri lítið og lætt.

Sjálvur havi eg eisini hoyrt eina sjúkrasystir greiða frá, at tá ungfólk koma á skaðastovuna við snuddum, gremja tey seg ofta nógv meir um larm í høvdinum og oyrunum, enn um skaðan, tey koma inn við. Ongin ivi er um, at hesi ungu hava verið á onkrum staði, har larmurin hevur verið so ovurhonds stórur, at hoyrnin hevur fingið skaða.

Men eisini smá børn eru í vanda. Tí kann tað renna mær kalt niður eftir rygginum, tá eg síggi børn í einum bili, har tónleikurin er á fullari styrki. Hoyrnin hjá børnum er als ikki liðugt búnað, og tí verða tey serliga meint rakt av larmi og óljóði.

Eg veit, at mynduleikarnir vita av trupulleikanum. Hendir onki á økinum verða alsamt fleiri ung fólk í vanda fyri at fáa hoyriskaðar og álvarsligar trupulleikar við hoyrnini

### Innilig áheitan

Ilt er at siga, hvussu vit best loysa trupulleikan, men málið má vera, at vit koma niður á null hoyriskaðar. Tí fari eg inniliga at heita á mynduleikarnar um at gera okkurt munagott, til dømis við at seta lógir og reglur í verk.

Eitt nú kundu ljóðmátarar, sonevnd "Ljóðoyru", verið settir upp á støðum, har vandi er fyri høðrum ljóði. Hesir ljóðmátarar vísa ein mynd av einum oyra, sum lýsir grønt, tá ongin vandi er, gult tá ljóðið nærkast vandamarkinum og reytt, tá vandi er á ferð.

Um watt-talið fer upp um eitt vist til konsertir og annað, átti tað verið eitt lógarkrav at tey, sum skipa fyri, fáa gyldugt loyvi frá mynduleikunum. Fyri at fáa eitt slíkt loyvi, eiga fyriskipararnir at lúka ymsar treytir, so sum áseting av aldursmarki fyri atgongd, umframt at høvuðsfyriskiparin skrivar undir uppá, at viðkomandi er greiður yvir vandan, sum kann standast av høðrum ljóði. Á tann hátt hevði eisini verið lættari at staðfest ábyrgdina, um skaði stóðst av ljóðinum.

Vónandi taka mynduleikarnir mína áheitan í álvara, so at vit í Føroyum kunnu gerast ein fyrimynd á hesum økinum.



*Ein einfaldur máti at ávara um vandamikið óljóð er sonevna "Ljóðoyra", sum lýsir grønt, gult ella reytt alt eftir, hvussu stórur ljóðvandin er*

*Til ber at lesa meir um hetta evni í bókini Pas på ørene- Tinnitus, høreskader, forebyggelse og behandling eftir tónleikaran Henrik Strube*


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.